FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøtersgøta 7
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tórshavn, 2. oktober 2025

Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

J.C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel. +298 352 500
Fax +298 352 501

setur@setur.fo

www.setur.fo

Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um veðurlagslóg

Fróðskaparsetrið heitti á Ragnheiður Bogadóttir, lektara í samfelagsvísindum, um at orða hoyringarsvarið vegna Setrið.

Viðvíkjandi endamáli
Lógaruppskotið miðar eftir netto null útláti í 2050, og hetta sendir greiðan boðskap um, at endamálið er fullkomið orkuskifti burtur frá fossilum orkukeldum. Tað er gott, men í praksis ber neyvan til hava netto null útlát, tí til dømis landbúnaður hevur við sær útlát (tí karbon og onnur vakstrarhúsevni innganga í lívsringrásirnar á jørðini).

Um útlátið í 2050 í Føroyum skal vera netto null ella tætt uppá tað, so er óneyðugt, at tað verður staðfest í § 3 Stk. 3, at útlátið skal roknast í mun til ávíst útgangsstøði, tvs. at minkingar skulu roknast í mun til útlátið, sum tað var ár 2010.

Hetta leiðir eisini til tað, sum eftir mínum tykki er mest týdningarmikið at fáa staðfest í lógini, nevniliga at minkingarnar í útláti skulu gerast sum skjótast (og við teirri tøkni og vitan vit longu hava), og at neyðugt tí er at seta greið ávegis mál.

At miða eftir lágum útláti í 2050 er frálíkt, og endurskoðan fimta hvørt ár fer vónandi at hjálpa til at røkka hesum máli, men er ikki nøkur trygd. Haraftrat er ikki líka mikið, nær útlátið verður minkað. Minka vit okkara árliga útlát við 100.000 tonsum í ár, so hava vit í 2050 tilsamans latið 2,5 mió. tons minni út í atmosferuna hesi komandi 25 árini. Skjótari útlátið verður minkað, minni órógva vit veðurlagið. Tí skjóti eg upp umframt 2050-málið at leggja eina grein ella eitt stykki aftrat:

> *"Í 2032 skal útlátið av vakstrarhúsgassi verða minkað við í minsta lagi 30 prosentum í mun til útlátið í 2010."*

Hetta var endamálið við uppskotinum um dagførdan orku- og veðurlagspolitikk (LM-130/2021), sum varð lagt fram av verandi andstøðu og samtykt. Við stuðli frá verandi samgongu átti tað tí at fingið breiða undirtøku í tinginum, og tað hevði tryggjað, at ikki øll tiltøkini bíða til seinastu løtu.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Viðvíkjandi útrokning av útláti
Tað eigur at standa meiri greitt, helst í lógini, men í øllum førum í viðmerkingunum, hvussu útlátið verður roknað. Tað er týdningarmikið, at útrokningarhátturin heldur seg til karmarnar, sum altjóða samfelagið setir. Sambært vegleiðingini hjá IPCC skulu bunkringar hjá fremmandum fiskiskipum teljast við í uppgerðini hjá landinum, har skipið bunkrar. Afturímóti telja bunkringar hjá føroyskum fiskiskipum í fremmandari havn ikki við.

Um ikki hetta stendur heilt greitt, er vandi fyri misskiljingum av sama slagi sum við Løgtingsmáli LM-130/2021: "*Uppskot til samtyktar um mál Føroya at minka útlátið av vakstrarhúsgassi komandi 10 árini og uppskot til dagførdan orku- og veðurlagspolitikk*". Har stendur ikki, tað eg dugi at síggja, hvussu útlátið verður roknað. Tað er tó ikki sambært vegleiðingini hjá IPCC. Hetta sæst av viðmerkingunum til uppskotið, har tað stendur: "*Hildið verður, at talan er um ambitiøst mál, tí ein 30 prosent minking í mun til útlátið í 2010 svarar til nærum 50 prosent minking í mun til útlátið, sum tað var í 2020, tá samlaða útlátið fór uppum 1 mió. tons CO2-eindir*". Sambært árligu frágreiðingunum frá Umhvørvisstovuni fór føroyska útlátið upp um 1 mió. tons CO2-eindir í 2017 (ikki 2020). Um vit hinvegin ikki rokna bunkringar hjá fremmandum fiskiskipum við, so fór útlátið upp um 1 mió. tons í 2020. Ætlanin tykist sostatt hava verið ikki at rokna bunkringar hjá fremmandum fiskiskipum við og heldur ikki uttanlands bunkringar hjá føroyskum fiskiskipum (ella flogførum o.s.fr.). Ein komandi veðurlagslóg eigur ikki at vera so leys, at hon kann tulkast ymiskt.

Viðvíkjandi Veðurlagsráðnum
At avmarka talið av umboðum í Veðurlagsráðnum til trý fer eisini at avmarka teirra ráðgeving munandi. Skal lógin hava ætlaða úrslitið, fer hon at ávirka allar partar av føroyska samfelagnum: Orkuframleiðslu, el-framleiðslu, landbúnað, fiskiskap, framleiðsluvinnu, handilsskap, infrakervi, samferðslu, húsabygging, o.s.fr. At finna trý fólk við nóg breiðum kunnleika til at meta um møguleikar og avleiðingar innan øll hesi øki er neyvan gjørligt. Til samanberingar hevur danska "Klimarådet" níggju limir sambært teirra heimasíðu (https://klimaraadet.dk/). Hóast Føroyar eru minni enn Danmark, eru okkara trupulleikar neyvan minni fjølbroyttir enn teir donsku. Eg mæli til, at Veðurlagsráðið hevur í minsta lagi fimm limir og uttan nakra avmarking í tali uppeftir. Her má tankagongdin heldur vera, at um ávísir førleikar mangla í Føroyum, mugu teir finnast uttanlands. Ein veðurlagslóg er eitt átak vit gera sum partur av altjóða samfelagnum, og eitt veðurlagsráð hevur sjálvsagt tørv á góðum samskifti og samstarvi til hesa uppgávu, bæði úteftir og inneftir.

Eisini er ásetingin um skrivstovuhald sera avmarkandi. Um Veðurlagsráðið skal kunna lyfta sína sera stóru uppgávu, má tað hava eina umsiting við fólki í føstum starvi. Danska "Klimarådet" hevur eitt sekretariat við 30 starvsfólkum. Og skal Veðurlagsráðið verða óheft, má tað hava eina óhefta umsiting, hvørt tað er sum ein sjálvstøðug deild á Umhvørvisstovuni, Fróðskaparsetrinum, Landsbankanum ella aðrastaðni. Endamálið við at hava eitt so lítið Veðurlagsráð uttan egna umsiting tykist vera sparing (300.000 krónur), men hon tykist órealistisk. Skal lógin hava ætlaðan virknað, fer tað at krevja sera stórar umleggingar av føroyska samfelagnum, íløgur og íløguflutning í milliardaupphæddum. Veðurlagsráðið skal tryggja, at hesar umleggingar verða gjørdar á skilagóðan og rættvísan

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

hátt við minst møguligum skaðiligum avleiðingum og við størst møguligum samfelagsligum vinningi, sum tað stendur í lógaruppskotinum: “*tryggja okkum og komandi ættarliðum, javnbjóðis kor at liva og virka undir, bæði á landi og sjógvi*”. Tað ber bara til, um ráðið hevur eina breidd og eina umsiting, sum ger tað arbeiðsført.

Vegna Fróðskaparsetur Føroya

Johan Ísak Suni Hansen, fyrisitingarstjóri